Bøgesvang fyllir 60:

# Fekk smílið inn í føroysku gudstænastuna

HEILSAN

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Í dag fyllir Henning Bøgesvang, prestur 60 ár. Hann er staddur í Gøteborg sum sjómannsprestur og føðingardagurin verður hildin á sjómannskirkjuni fyri øllum sum hava hug at koma.

Henning var prestur í Klaksvík, Kunoy og Kallsoy í yvir 20 ár og undan tí hevði hann eisini starvast sum sjómannsprestur.

Henning Bøgesvang fekk eina heilt nýggja dimensión inn í føroysku gudstænastuna. Hann uppfatar gleðiboðskapin sum nakað gleðiligt. Gleði og smíl hoyra saman, og tí ber tað til at bera boðskapin fram á ein stuttligan hátt.

Henning skakaði føroyska kirkjuliðið, tá hann fór at nýta Dúnald Dunnu og Gírik MakGvagg í prædikuni og eisini tá hann nýtti smáar vittigheitir, sum fekk kirkjuliðið at flenna og næstan at klappa. Men ein djúp meining lá aftanfyri.



Henning er eitt stórt menniskja, og hann djúpt rótfestur í trúnni. Hann trýr upp á tað góða í menniskjuni og trýr eisini, at á botni er alt sára gott. Hann gjørdist, beinanvegin tá hann kom til Føroya, sera væl umtóktur sum útvarpsprestur, og hann megnaði at rúnarbinda tey sum ikki tímdu í kirkju til útvarpslurtið við sínum djúpu prædikum.

Ein prædika, sum fekk stóra umrøðu aftan á var ein útlegging hann hevði at tí sjúka við Betesdabrunnin. Í staðin fyri at taka synd í manninum fór hann at bora í setninginum Jesus segði við mannin: »Vit tú vera frískur?« og førdi tað síðan yvir á nógvar føroyingar, sum hava funnið tað sum ein lívsstíl at vera sjúkir. »Vilja vit vera frísk?«

Henning Bøgesvang hevur eisini roynt seg sum sjómannsprest í tropunum. Hann kláraði at fylla sjómanskirkjuna í Singapore. Hann sá øgiligur út í tøvda prestakjólanum, meðan sveittin rann av honum og hansara prædikur vóru havdar á munni leingi aftan á í øllum hitanum.

Henning dugir væl at lurta og hava áhuga fyri tí einstaka menniskjanum. Tí hevur hann eisini gott samband við sjómenn, sum hann dagliga hittir í sínum arbeiði. Hjá bløðunum hevur hann mangan verið góður at heita á í skriving um andalig viðurskifti. Sosialurin ynskir honum hjartaliga tillukku við føðingardegnum.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitalagið millum ÷ 1 og + 2 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av eystri og landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og fyrrapartin turt, men seinnapartin veksur hann vindin til hvassan vind og regn. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin hvassur vindur ella skrið av suðri og regn ella mjørki. Hitin um 9 stig. Sunnudagin stívt andøvsgul av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin um 4 stig.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷15 |
| Nuuk | ÷8 |
| Qaqortoq | 3 |
| Ammassalik | ÷10 |
| Saint John's | ÷3 |
| Halifax | 0 |
| Reykjavík | ÷2 |
| Seyðisfjørður | ÷5 |
| Tórshavn | 0 |
| Lerwick | 3 |
| Aberdeen | 10 |
| London | 10 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 4 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 3 |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | 5 |
| Moskva | 9 |
| Berlin | 14 |
| Warzawa | 15 |
| Kiev | 5 |
| Bukarest | 10 |
| Paris | 10 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 15 |
| Malorca | 20 |
| Athen | 14 |
| Malta | 19 |
| Tunis | 19 |
| Beijing | 13 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 24 |
| Sydney | – |
| New York | 2 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 33 |
| La Paz | 10 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 17 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt hátrýst, 1022 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum fer eystureftir og gevur góðveður teir fyrstu dagarnar.




Lágtrýstið vestan fyri Skotland stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjadagin.við lýggjari veðri.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 18/03 kl. 06⁰⁰– 19/03 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: ÷0,6°
Minsti hiti máldur í mars: ÷8,7° Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 18/03 kl. 06⁰⁰– 19/03 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mars: 28,9 mm

### VESTFALLSKYRRINDI

| Dagur | Suðuroyar—/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar—/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna—sundi fp. | sp. | Mykines—firði fp. | sp. | Nólsoyar—firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna—sundi fp. | sp. | Fugloyar—firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 20. mar | 10.56 | 23.12 | 09.56 | 22.12 | 10.11 | 22.27 | 00.34 | 12.56 | 01.34 | 13.56 | 09.11 | 21.27 | 08.11 | 20.27 | 11.11 | 23.27 | — | 12.11 | 10.41 | 22.57 | 11.56 | — |
| 21. mar | 11.38 | — | 10.38 | 23.05 | 10.53 | 23.20 | 01.12 | 13.38 | 02.12 | 14.38 | 09.53 | 22.20 | 08.53 | 21.20 | 11.53 | — | 00.27 | 12.53 | 11.23 | 23.50 | 00.12 | 12.38 |
| 22. mar | 00.05 | 12.44 | 11.44 | — | 11.59 | — | 02.05 | 14.44 | 03.05 | 15.44 | 10.59 | 23.38 | 09.59 | 22.38 | 00.20 | 12.59 | 01.20 | 13.59 | — | 12.29 | 01.05 | 13.44 |
| 23. mar | 01.23 | 14.03 | 00.23 | 13.03 | 00.38 | 13.18 | 03.23 | 16.03 | 04.23 | 17.03 | — | 12.18 | 11.18 | 23.58 | 01.38 | 14.18 | 02.38 | 15.18 | 01.08 | 13.48 | 02.23 | 15.03 |

14. mars: Tendring/Mánin longst frá jørðini
22. mars: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2002

5 707265 100036 >